Hans Pauli Strøm, landstýrismaður í almanna- og heilsumálum:

# Nýggja tøknin gevur øgiligar møguleikar

DOWNS SYNDROM

*Eydna Skaale*

–Nýggja tøknin gevur veruliga øgiligar møguleikar, sum reisa stórar etiskar spurningar og koma við stórum avbjóðingum. Hetta er eitt stórt, tungt mál, sum er sera torført at taka støðu til, tí tað er einki eintýðugt svar. Og áðrenn politikararnir taka málið upp, er ynskiligt, at tað fær drúgvari viðgerð í almenna kjakinum. Hetta málið má ikki verða avgjørt av politiskum tilfeldigheitum, soleiðis, at tað t.d fær týdning, hvør situr á hvørjum sessi, tá málið kemur fyri, segði Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður á pallborðsfundinum hjá Javna.

– Mítt ynski er, at hetta verður eitt langt kjak, áðrenn politikararnir koma uppí. Tað vísir seg nevniliga ofta, at politikarar hava lyndið til at draga samanum ov skjótt og á tann hátt at drepa debattina.

### Nýtt etiskt ráð stovnast

Hans Pauli Strøm skjýtur upp, at seta eitt etiskt ráð ella eitt siðsemisráð, við hollum fakkunnleika og virðing fyri øllum pørtum og meiningum í málinum, at ráðgeva í kjakinum. Tað skal virka øðrvísi enn núverandi siðsemisnevnd, tí etiska ráðið skal virka útum bara teir heilsuligu spurningarnar, og taka tilveru spurningar upp eisini. Ráðið skal vera ført fyri at betra um grundarlagið undir kjakinum og kortleggja allar greinar av málinum. Har skulu sita fólk, sum vita hvat tey tosa um.

Landstýrismaðurin ætlar sær í næstum at fara at spyrja seg fyri um mannagongdir o.t. í einum slíkum máli. Hvussu eitt slíkt ráð verður stovnað og hvussu skjótt tað kann lata seg gera at fáa tað upp at koyra. Men sjálvsagt er eisini neyðugt við politiskari undirtøku.

– Eg fari at spyrja hinar landstýrismenninar um teir taka undir við hesum uppskotinum, og so fari eg í gongd. Hetta er nakað, sum eg absolut fari at arbeiða við, og eg eri glaður fyri, at Javni byrjaði orðaskiftið. Hetta er ein góð grund at fáa hetta arbeiðið gjørt, sigur landstýrismaðurin.

### Týdningarmikið kjak

– Í Føroyum gerst kjakið ofta ógvuliga einstáttað. Meiningarnar eru antin svartar ella hvítar. Tað er ofta ein stongd debatt, sum ikki greinar málið serliga væl út. Men vit mugu royna at fáa hetta málið so væl lýst frá øllum síðum, sum gjørligt. Tí hetta er, sum sagt, eitt stórt og tungt mál, sum er ringt at taka nakra endaliga niðurstøðu í, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann sigur víðari, at hetta er eitt mál, sum setur fólk í tvístøðu, í orðsins sanna týdningi.

– Eg fái ikki sagt hvat er beint at gera og ikki, tí eg veit ikki hvat eg skal halda. Hetta er eitt ógvuliga eymt mál, við nógvum síðum. Tað ber ikki til at gera eina niðurstøðu bara soleiðis, og siga hvat er rætt og skeivt. Tí er tað so týdningarmikið at fáa lýst málið so væl sum gjørligt og fáa eitt breitt alment kjak, sigur hann.

### Vantandi tilboð

Landstýrismaðurin segði seg vera fullgreiðan um, at tilboðini til tey brekaðu í dag ikki eru nøktandi.

– Tørvur er á bæði frítíðarítrivum, arbeiði og bústovnum. Og eg ætli mær at fara at kanna, hvat kann gerast í málinum.

Hann sigur seg væl duga at skilja, at tað hevði gjørt valið hjá nógvum mammum lættari, um tilboðini og hjálpin frá samfelagnum vórðu størri.

– Sjálvsagt hevði tað havt ávirkan, um ungar mammur vistu, at tað var dygg hjálp at heinta, segði hann. Men hann vísti samstundis eisini á alt sum er hent seinastu árini. Fyri fáum árum síðani vóru fólk við breki send av landinum. í dag verða tey gótikin, sum ein partur av samfelagnum. Ein hugburðsbroyting er farin fram, og tað ger tað nógv lættari at hava eitt brekað barn í dag. Hans Pauli Støm fegnaðist eisini um, at stig var tikið til kjakið.

– Eitt kjak sum hetta, kann varpa ljós á viðurskiftini og á tann hátt lætta um, tí fólk fáa eyguni upp fyri støðuni, segði hann.



*Landsstýrismaðurin og onnur lýddu á, tá Pál Weihe greiddi frá*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

*Framhald av síðu 11*

er ringt ikki at taka støðu. Men meiningin hjá læknanum má aldri skína ígjøgnum, tí valið skal takast av kvinnuni sjálvari. Hon má ikki ávirkast, bert kunnast um vansar og fyrimunir, sigur Pál Weihe.

– Læknin má tí vera ógvuliga fíntfølandi og respektera kvinnuna, um hon ikki ynskir royndina tikna. Hinvegin er tað eisini uppgáva læknans at kunna kvinnuna so mikið væl, at hon kennir allar neyðugar upplýsingar og hevur grundarlag at siga nei. Hon má aldrin kenna seg trýsta ella lokkaða til eina avgerð. So tað verður sera torført at finna javnvágina, sigur hann.

Hann førir fram, at fyri at tryggja ímóti læknaligari ávirkan, kundi t.d. verið ein checkbók, sum punkt fyri punkt vegleiddi læknan. Á henda hátt hevði eisini verið tryggjað, at allar kvinnur hoyrdu júst tað sama, hóast ymiskar læknar. Kvalitetskravið er sera stórt frá danskari síðu. Kvinnan skal nevniliga ikki angra valið hon tekur.

– Tað ræður um hjá øllum læknum at finna fíntfølilsið fram, staðfesti hann.

### Stórur vandi av kanningini

Pál Weihe legði eisini stóran dent á vandan, ið stendst av fosturvatnskanningini. Av hvørjum 700 royndum, sum verða gjørdar eru tað 70 fostur, sum doyggja av kanningini og umleið 40 fostur, sum verða funnin við breki. Tað vil við øðrum orðum siga, at talið av fostrum, sum lata lív av kanningini er næstan dupult so stórt, sum talið av fostrum sum verða funnin við breki, t.d. Down's Syndrom. 70 frísk fostur lata lív fyri at finna 40 sjúk, stutt og greitt.

– Í Føroyum verða tiknar uml. 20-30 fosturvatnskanningar árliga. Tað vil siga, at eini 4% av kvinnunum fáa royndina gjørda. Samanbera vit við grannalondini, so liggur Danmark ovarliga við 13%, meðan Norra liggur niðarliga við 2%.

Hesi seinastu árini er talið av kanningunum tó fallið, møguliga orsakað av stóra vandanum, møguliga orsakað av óvissuni av kanningini. Kanningin gevur tær ikki eitt ja ella nei svar, um barnið er brekað, men gevur tær bert nøkur sannsýniligheitsúrslit.

Fleiri børn, sum eftir kanningini vórðu skýrd at verða brekað eru, tá avtornar, púra frísk og vanlig. Og øvugt, børn, søgd at verða normal, hava víst seg at vera brekað.

Men fallandi talið kann eisini koma av broyttum hugburði. Tað er í dag í lagið at hava eitt brekað barn, tey verða í dag góðtikin. Fara vit bert eini 20-30 ár aftur í tíðina var støðan heilt øðrvísið, vísir Pál Weihe á.

### Kanning hevur týdning

Pál nevndi tó eisini aðrar hættir at kanna fostur. T.d. við blóðroyndum, har sonevnda "tripletestin" verður tikin. Tá taka tey 3 kromosom og kanna tey, og kunnu so m.a. staðfesta Down's Syndrom. Ultraljóðscanningar verða eisini nýttar í viku 18-19.

– Tað er sera týdningarmikið at kanna fostur, ikki bert fyri at vita um tey skulu týnast, men fyri at síggja um tey kanska skulu hjálpast. Avgerð kann takast um mamman kanska skal eiga á einum sjúkrahúsið við ávísum serlæknum, so at barnið, um tað er sjúkt, kann fáa bestu viðgerð beinanvegin.

– Vit mugu minnast til at taka dagar ímillum orsøkirnar til kanningarnar. Summar mammur halda, at tað rakar ongan hvussu ófødda barnið er skikkað. Tær ynskja ikki kanningarnar, og tað er eisini í lagið. Men tað kann ikki vera skeivt at hava áhuga í heilsuni hjá fostrinum. Vit eru t.d. í dag komin so langt, sum at tosa um fosturheiligvág, segði Pál.

### Hvar skal markið setast?

Sum svar uppá spurningin um hvar markið skal setast, svaraði hann, at tað er ógvuliga ringt at siga.

– Tað kann skjótt gerast hættisligt at lata tøknina sjálva seta markið, tí um nøkur fá ár fara vit helst at síggja persónligheitina í genunum. Vit fara at kunna staðfesta hvør hevur "skurka-anlegg" í genunum og hvør ikki hevur. Tá verður skjótt til, at fostur verða vald eftir persónligum eginleikum. Men hinvegin er ringt at sita inni við eini vitan og ikki geva mammuni møguleikan at velja, um hon ynskir at verða kannað, segði hann at enda.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sp/f PE:

# Flyta úr Stoffalág til Heykavegin



*Petur Eirik Djurhuus, stjóri á Sp/f PE, framman fyri nýggja handilin sum um stutta tíð letur upp við Heykavegin. Hann hevur eisini ein handil á Argjum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Vegna ov trongar umstøður flytur matvøruhandilin Sp/f PE um stutta tíð úr Stoffalág til Heykaveg 2, har bilasølan hjá Meinhardt Arge og klædnahandilin Jungmann fyrr hava hildið til**

FLYTING

*Sigga-Maria/Fríða*

Eftir 21 ár í Stoffalág flytur matvøruhandilin Sp/f PE um stutta tíð til Heykaveg 2, har bilasølan hjá Meinhard Arge og klædnahandilin Jungman áður hava verið. Flestu munnu forvitnast um, hví tað er.

Tað kemst av at umstøðurnar eru ov trongar. Goymslan er blivin ov lítil, og ov trongligt er at parkera bilin í Stoffalág. Eisini er leigusáttmálin um at renna út, greiðir Petur Eirik Djurhus, stjóri í Sp/f PE, frá.

Vit hava valt at flyta júst til Heykavegin, tí at handilin skal helst liggja nøkulunda í sama grannalag. Lætt er at koma til handilin, av tí at ringvegurin liggur tætt við. Eisini eru nógv arbeiðspláss har í nánd, sigur Petur Eirik.

Vit vænta ikki at missa kundar orsakað av at vit flyta. Vit vóna, at handilin er so mikið væl umtóktur, at kundarnir fylgja við og fara at dáma tær nýggju umstøðurnar, sigur stjórin í Sp/f PE, Petur Eirik Djurhuus.

Handilin fer tó at varðveita navnið Sp/f PE.

## Dagurin

**17. mars. Geirtrúð,** deyð í 659. Dóttir Pippin eldra og abbasystir Karlamagnus. Fór ung í kleystrið í Nivelles í Belgiu og gjørdist eisini abbadissa har. Millum annað var hon verndari hjá ferðandi fólki, og við nógvar vegir í Evropa vórðu bygd sanktugeirtrúðtilhald, har tey ferðandi og tey fátæku kundu fáa hjálp.

Navnið er týskt, samansett av orðunum *spjót* og *styrki*.

Hesin dagurin verður í Mikinesi eisini nevndur **pátriksmessa**. Pátrikur var apostul Írlands. Tá ið hann doyði í 461, hevði hann bygt nógvar kirkjur og stovnað kleystur, og tað var frá hesum kleystrum, at írskir munkar hava leitað higar og fingið sær tilhald – eitt nú í Mikinesi, har pátriksmessa hevur verið hildin.

Latínska navnið *patricus* merkir *aðalsmaður*.

## Minningarorð um okkara høgt elskaða beiggja Villa Hansen

Dagurin tann 9. november veðrur ongantíð gloymdur, tá tú so brádliga varð tikin frá okkum.

Tað vardi okkum ikki kvøldið fyri, tá tú sum vanligt var og vitjaði okkum øll, sum tú altíð gjørdi.

Í góðum lag og val til passar sum altíð. Vit elskaðu teg so høgt, og hava altíð verið sera góð sum systkin, altíð haft umsorgan fyri hvørjum øðrum.

Tað er so nógv at minnast aftur á.

Allar teir góðu túrarnar í haganum á hvørjum sumri, tú elskaði náttúruna og tey hugnaligu fuglaljóðini.

Tey var neyvan nakar fuglur sum tú ikki visti navnið á. Tú var so góður við øll dýr, eins tú eisini var góður við øll menniskju. Aldrin eitt ringt orð at siga um nakran.

Tað er ógvuliga tómt hjá tær góða Lisa. Tí sum tú sjálv sigur »At ein so góðan mann, kundi tú aldrin fingið aftur, sum altíð var í góðum lag, og góður at hava við at gera, tí illsinni var ikki skapt í honum«.

Nú hevur tú so trý ommubørn góða Lisa, sum eru ein troyst hjá tær at hava.

Børn hevur tú haft nógv, Ann-Britt var nógv hjá tykkum tað tíðina, eg ikki hevði tað so gott, hon var eisini góð við tykkum og treivst væl har. Har hava øll børn trivist og følt seg vælkomnan.

Góði Villi saknurn og longsulin eftir tær er so stórur, at tað kann ikki sigast í orðum. Ikki minst hjá mammu og Berta, har tú oftast var tvær ferðir um dagin og vitjaði mammu, ongin av okkum dugir við tí enn, at tú er farin frá okkum og ikki kemur inn aftur.

Við tínum lætta lyndi, og tínum smíli, tað fekk ein í gott lag. Altíð visti tú okkurt skemtiligt at siga frá og tað var so hugnaligt at fáa teg inn. Vit mugu læra okkum at liva við tí, at tú er farin góði beiggi okkara.

Gud styrki teg góða Lisa og hjálpi tær at koma ígjøgnum komandi tíðir og teg góða mamma, sum hevur mist so nógv – fýra børn í bestu árum.

Friður verið við minninum um okkara høgt elskaða og djúpt saknaða beiggja, Villi Arnholdsson Hansen.

*Farvæl, farvæl, men ikki ævigt nei!*
*Ein stuttan dag, eitt lítið tíðarskeið*
*So hittast vit har skilnaður er ei*
*og inntil tá farvæl.*

**Systrarnar Tóra og Elinborg**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaða mamma, vermamma og omma okkara

**Omi Hansen**
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur og kransar og tøkk til tykkum, sum lótu eina gávu til Vestmanna kirkju.
Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Jógvan og Virgar**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Rigmor Jacobsen**
fødd Tórsheim
Tórshavn

andaðist og varð jarðað

Tøkk fyri blómur og kransar og peningagávur til Tilhaldið.
Eina serstøka tøkk til tykkum á B6.
Hjartans tøkk øll tit sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjurnar vegna*

**Høgni og Anna**